# Gamli maðurin á sjónum



*Theodor Thomasen í Sørvági fyllir 96 ár tann 28. oktober. Hann er uttan iva elsti aktivi útróðrarmaður í landinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Theodor Thomasen á floti ein summardag í 2004. Maðurin er einsamallur á báti 95 ára gamal*
*Mynd. Edvard Joensen*

Hann fylir 96 ár í næstu viku og rør framvegis einsamallur út í seksmannafarinum Fossi úr Sørvági. Hetta verður seinasta árið sigur hann. Men tað vilja børnini vera við, at hann hevur sagt so ofta. So hann flotar nokk aftur kortini

PRÁT
*Edvard Joensen*

Sørvági: Hin gamli maðurin býr einsamallur í húsum sínum í Liðabrekkuni í Sørvági. Hann er 95 ára gamal og rør einsamallur út við seksmannafarinum Fossi. Ikki soleiðis, at hann rekur nakran vinnuliga útróður av týdningi, sigur hann. Hann flotar, tá líkindi eru.

–Men eg eri á floti í tonkunum hvønn einasta dag, sigur Theodor Thomasen og hyggur yvir á fjørðin. Kennir á merkjunum her inni, hvussu voðrið er uttanfyri.

Ikki tí. Tað kann væl síggja gott út her inni, um farandi ikki er um Sundið fyri brim. Ella øvugt. Ikki alt sæst hiðani.

–Mykinesmenn plagdu at siga, at sørvingar vóru altíð ein dag ov seinir til útróðrar. Mykinesmenninir sóu fyrr, nær brimið minkaði, sigur hann.

Úr kjallaranum tekur hann trýhjólaða prutlið og koyrir út til bátahylin, har Fossur liggur í bási sínum við flótibrúnna. Hann er hvítur við grønum stokkum og húsi. Tríggjar elektriskar snellur standa á stokkinum.

Hann brúkar bara tein og agn. Plagar at brúka snelluna at fíla við. Tað er lættari at draga enn at halda snøri upp á gamla mátan. Línu egnir hann ikki.

Heima í kjallaranum liggja tvær gággurúsur. Og ein minni av nýggjara slagnum - ein plastikdunkur við boyu og standara - liggur í bátinum.

Men nú fiskar hann ikki gággurnar sjálvur. Tað, hann skal brúka, plagar hann at fáa frá onkrum av teimum yngru, sum fiska kortini.

Og teir eru allir yngri. Helst eru øll i Sørvági yngri enn hann, heldur Theodor. Og her á firðinum vita teir bara um ein, sum var eldri, tá hann flotaði. Tað var Nóa gamli. So her er gott at samanbera við.

Jú, hann er enn á floti av og á. Men nú er hann sjálvur farin at ivast í, hvussu skilagott tað er. Tí nú eru eyguni farin at bila so mikið, at tað gongur illa at síggja ítini. Men honum dámar væl at royna seg fram. Kasta her og har fram við landi og vita, um nakað livir undir bátinum.

Tað er so fittligt at sleppa at gera sum ein vil, heldur hann. Ongan annan at hava at hugsa um. Og so er heldur eingin, sum kemur við býttum viðmerkingum, um ikki alt gongur, sum tað varð ætlað.

–Ger man okkurt býtt, er ikki neyðugt, at nakar annar fær tað at vita, tá man er einsamallur, flennir Theodor.

Eyðvitað er, at nú aldurin er vorðin so høgur, er okkurt, sum fer at merkjast, sigur hann. Til dømis dámar honum einki at fara nakran veg, tá óslætt er.

–Ryggurin og lendarnir tola ikki rullið. Og eg klári ikki eitt heilt sjóvarfall longur. Men tað ger einki. Eg haldi, so leingi eg haldi, og tað er so tað.

Hann avreiðir bara, tá hann hevur fingið meira enn eina »cent«, sum er hundrað pund. Tá tað er minni enn so, verður tað givið burtur ymsastaðni. Seinasta dagin, hann var á floti herfyri, avreiddi hann 88 kg.

–Tað er eingin nøgd at reypa av, men tað stendur so í mun til mannin, sum fiskar, sigur Theodor.

Hann fer ikki so langt nú. Onkran túr á Grunnin. Undir Mykines viðhvørt, men fyri tað mesta er hann á firðinum, sigur hann.

Fossur er umleið 25 ára gamal. Undan honum hevur Theodor havt fleiri bátar. Bæði smáar og eisini størri før. Upp í eini 30 tons mundi Gáshólmur vera, sum hann hevði áðrenn seinna hemsbardaga. Teir fiskaðu kalva. Gáshólmur vaðr seldur til Kjølbro. Eftir tað hevði Theodor ein minni bát. Ein motorbát, sum hann nevndi Skerhólm. Tann einasti, hann hevði undan Fossi, hevði eitt heldur sjáldsamt navn, greiðir Theodor frá við einum skeivum smíli. Hann kallaðu teir Sjussur. Tað hevði nokk okkurt at gera við teir, sum áttu bátin undan honum, heldur hann.

Theodor hyggur yvir á fjørðin. Honum dámar einki líkindini. Eingin nytta man vera í at fara nakran veg í dag heldur enn í gjár, heldur hann. Hann sær á vindinum her inni, hvussu væntast kann at vera uttanfyri, og ger av, at vit fara bara heim í køkin hjá honum at práta eina løtu. Dóttirin hevur verið og gjørt kaffi til okkara, sigur hann.

Og tað gera vit so. Fáa eitt prát um leyst og fast. Men mest um tað, hann í sínum langa lívið hevur havst at.

Hann fór sum so mangur til skips sum 14 ára gamal. Við deyðsiglara. Fekk »smittuna«, sum teir nevndu tuberklarnar, umborð á Oskari í 1928. Tað gjørdi so, at hann ikki fór avstað aftur beinanveg, men lá heima í eini tvey ár. Róði út við onkrum eldri monnum.

–Sjógvurin man vera øgiliga góður fyri heilsuna hjá fólki, hugleiðir Theodor. At menn ikki gjørdust sjúkir av teimum umstøðum, teir búleikaðust undir umborð á gomlu skipunum, er at undrast á. Stúgvaðir saman í eitt vánaligt lugar. Einki var at turka klæðir á uttan ein snórur yvir kabússini. Eina máltíð um dagin. Tað var døgurðin. Restin var keks og tevatn. Men teir flestu yvirlivdu. Tað er at undrast á, heldur Theodor.

Og so baksaðist hann við eitt sindur av hvørjum øll árini. Hevur ongantíð havt nakran fastan arbeiðsgevara, sigur hann. Altíð sjálvur syrgt fyri tí, sum inn kom. Hevði eisini handil eina tíð. Bygdi sjálvur handil beint niðan fyri húsini, hann býr í.

–Eg veit ikki, hvat eg hugsaði, tá eg fekk mær nýggjan bát sum 70 ára gamal. Teir flestu verða koyrdir til hús, tá teir eru 67, tí tá fáa teir at vita, at teir kunnu ikki brúkast meir. Nú munnu tey nokk halda, at eg kann heldur ikki brúkast. Tey hugsa nokk sítt, men tey siga einki, sigur Theodor og sipar til børnini.

Vanliga plagar hann at fáa bátin tiknan upp um veturin. Og tað verður hann eisini í vetur, sigur Theodor. Men hesaferð verður tað fyri seinastu ferð, heldur hann.

Ikki tí. Tað hevur hann sagt so ofta fyrr, hava børnini mint hann á. Men hvørja ferð, tað sumrar aftur, flotar hann. Og tað vænta tey eisini næsta summar, sigur hann seg skilja.

Men nú verður tað helst mest kjallarin, sum verður tilhaldið í vetur. Tí har plagar Theodor at sita og gera model av ymiskum brúkslutum, sum hann minnist, men sum ikki verða brúktir til annað enn pynt í dag.

Vit fara niðurundir. Har hevur hann sag og klemmur. Amboð av ymsum slagi og eina rúgvu av lutum, hann hevur gjørt.

Í løtuni liggur ein landleypur í tvingunum. Er sagaður til úr plátu og síðan límaður saman. Nú skulu tvingurnar halda, til límið er tornað.

–Hetta man ikki síggja nakað út. Er gjørt í blindum, heldur hann.

Men ikki bilar. Væl sær út, eins og restin, han hevur liggjandi. Smáir leypar, vaðkallar, tyrlar og spónir saman við eini rúgvu av øðrum lutum, sum nógv í dag ikki kenna.

Tá spurt verður um okkur serligt, tekur hann tað í hondina og følir eftir tí, áðrenn hann sigur, hvat ið er.

Tað eu eyguni, ið eru farin at bila, og nú væntar hann, at hann bara fer at flota í huganum. Tí tá ein ikki sær ítini,er ikki nógv at fara til, heldur hann.



*Hóast høga aldurin er hann lættur á føti og fýrir ikki fyri at fara eftir básinum umborð á Foss*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Tað einki fyri at seta í gongd, nú tað bara er at snara ein lykil. Øðrvísi var fyrr, tá gamli Solomoturin skuldi vindast í gongd*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Hóast tað er friðaligt inni í bátahylinum, sær einki út uttanfyri, so Theodor ger av ongan veg at fara í dag*
*Mynd: Jens Kristian Vang*